## Bankastjórar koyrdir

Forstjórin í Roskilde Bank, Søren Kaare-Andersen, gjørdi í gjár greitt, at tilvildarligi kredittpolitikkurin fór at fáa avleiðingar í fyritøkuni. Fyrstu høvdini rullaðu í gjár, skrivar børsen.dk. Tað var stjórin fyri vinnu og kredit í Roskilde Bank, Allan Christensen, ið fekk fyrsta gráa pappírið. Somuleiðis er vinnustjórin, Lars Jensen, koyrdur saman við trimum vinnuráðgevum við stórum vinnukundum.



## Danir ringir gjaldarar

Eitt vaksandi tal av dønum megna ikki at gjalda sína skuld, og verða tí skrásettir sum vánaligir gjaldarar. Talið av málum per persón økist, og skuldin veksur, vísir ein uppgerð frá Experian RKI fyri fyrra hálvár í ár. – Hetta er fyrstu ferð í tvey ár, at talið av vánaligum gjaldarum veksur, sigur talskvinnan fyri Experian, Camilla Rose. Tað vísir seg, at helmingurin av teimum skrásettu eru fólk, sum ganga aftur. Samlaða skuldin er nú oman fyri 8,4 milliardir krónir.

# Dansifrøi kann halda fram

**Málið um bygningin hjá Dansifrøi hevur eftir øllum at døma fingið eina loysn, og felagið kann halda fram við byggingini**

BYGGIMÁL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Dansihøllin hjá felagnum Dansifrøi hevur verið nevnd speglvendi bygningurin. Men sum skilst á lagnum er ikki talan um eina speglvenda høll.

Hinvegin eru broytingar gjørdar í mun til uppruna tekningina, so bygningurin ikki longur er í tráð við givna byggiloyvi.

- Vit hava fingið eina fráboðan frá Dansifrøi um, at teir fara at halda seg til byggiloyvi, og so er eingin trupulleiki, sigur Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri hjá Tórshavnar Kommunu.

Byggingin hevur annars ligið still í fleiri mánaðir, men hetta er ikki minst orsakað av summarfrítíðini.

Partarnir hava tosað saman fyri at finna fram til eina loysn, og við hesi fráboðanini frá Dansifrøi til Tórshavnar Kommunu kann byggingin halda fram.

- Teir noyðast at gera onkrar smávegis broytingar, men annars er einki til hindurs fyri, at byggingin kann halda fram, sigur Jákup Egholm Hansen.

Arbeiðið er ikki tikið upp aftur enn, men nú er tað ikki Tórshavnar Kommuna, sum liggur í buktini.

Andreas M. Andreasen, nevndarlimur í Dansifrøi, vil ikki úttala seg í málinum, men vísir til formannin, Høgna Mikkelsen. Hesin er tó í summarfrí tvær vikur aftrat.



*Høllin hjá Dansifrøi er kortini ikki speglvend, og við smávegis broytingum kann felagið halda fram við byggingini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Westward Ho setti inn í Hetlandi



*Westward Ho er seinkað á ferðini eystur til Stavanger á oljuráðstevnu*

**Veðrið í gjár og um vikuskiftið hevði við sær, at sluppin Westward Ho setti inn í Hetlandi**

OLJURÁÐSTEVNA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í Stavanger í Noregi leingjast teir eftir sluppini Westward Ho, sum skal verða við á oljuráðstevnuni í býnum.

Tað er vánaliga veðrið seinastu dagarnar, sum hevur ført til seinking, ikki minst tí valt varð at leggja inn í Hetlandi at kroka.

Nógvir føroyingar eru í hesum døgum í Stavanger á oljuráðstevnu, millum onnur borgarstjórin, Heðin Mortensen, sum vit høvdu í telefonini í morgun í øðrum sambandi.

- Westward Ho skal verða við í onkrum tiltaki hjá okkum, og tí bíða vit eftir henni. Men seinast eg visti roknaðu teir við at verða her í Stavanger einaferð seinnapartin, sigur Heðin Mortensen..

Veðrið er betri nú, men at nógvur vindur hevur verið, máttu teir sanna í Nólsoy, tá stóra mattjaldið hjá Stuðulsnevndini, sum stóð á keiini, fór í luftina mánanáttina og endaði á takinum á einum húsum ovari í bygdini.